# Vinnuhugaðir tingmenn

Næstan helmingurin av limunum í íslendska Altinginum eru skrásettir í partafelagsskránni sum stjórar, grannskoðarar, nevndarformenn, næstformenn ella vanligir nevndarlimir. Tilsamans eru tinglimirnir knýttir at 55 ymsum vinnufeløgum, skrivar Morgunblaðið. Fyri einum ári síðani vóru 34 tinglimir eisini partaeigarar í vinnufeløgum, men í daqg eru bara fýra eftir. Sjálfstæðisflokkurin er tann best umboðaði flokkurin í vinnulívinum. Av teimum 26 tinglimunum hjá flokkinum eru 17 stjórar, nevndarlimir ella grannskoðarar í vinnulívinum. Samfylkingin er næstbest umboðað við sjey av sínum 17 tinglimum.




# Kreppan rakar Hollywood

Virksemið í filmsupptøkuhølunum í Hollywood er minkað nógv í seinastuni orsakað av fíggjarkreppuni, og sambært blaðnum Los Angeles Times hava upptøkurnar ongantíð verið so fáar sum nú. Árið byrjaði annars væl hjá filmsfeløgunum, og fleiri fólk hava verið í biograf, men nú er so lítið at gera, at fleiri túsund fólk eru ella verða uppsøgd. Hagstovan í Kailfornia sigur, at 22.000 fólk í films- og undirhaldsvinnuni mistu arbeiðið í januar, og tað svarar til 10 prosent av teimum, sum arbeiða í hesari vinnugreinini. Los Angeles Times skrivar, at býarmyndugleikarnir har fáa nú nógv færri umsóknir um loyvi at gera filmsupptøkur í býnum.



*Tiltakið á Bryggjuni í Vestmanna um Kap Farvel hevði stóran áhuga, og fólk vóru komin heilt úr Norðoyggjum, Vágum og Suðuroy*



*Erling Davidsen (høgrumegin), sum var dekkari umborð á Kap Farvel, tosar við Jónleif Joensen og aðrar*



*Hjúnini, Elisa og Edvard Ingebrigtsen, sum var fjarritari umborð á Kap Farvel*

er fjølritað og liggur eftir, sigur hann, at hetta nú verður goymt burtur – á tryggum stað.

– Hugnaløtan í Vestmanna skuldi vera og varð eisini rein "hygga", sum høvundurin tekur til, og nú verður so ikki meira gjørt burtur úr Kap Farvel á hesum sinni, leggur hann aftrat.

Tiltakið á lokalu pubbini í Vestmanna hetta kvøldið var liðugt um 23.30-tíðina, og tá fóru fólk heimaftur, meira vitandi og ríkari, enn tá tey komu.

– Jú, eg haldi, at hetta eydnaðist stak væl. Fólk høvdu nógv upp á hjarta, og fleiri ferðir hetta kvøldið var lívligt prát um ymisku myndirnar og persónarnar á myndunum.

Birgir sigur, at endamálið við tiltakinum var at fáa tilfarið, sum liggur eftir um Kap Farvel, víst fram, og heilt fram til leygarkvøldið komu fólk við nýggjum myndum.

– Vit kunnu kanska siga, at hetta var eitt vakurt "farvæl" til Kap Farvel, sigur Birgir W. Høgnesen.

At hjálpa sær við tí tekniska partinum, hevði høvundurin vestmenningin, Páll Hellu.

Kap Farvel varð á mannamunni mangan róptur "skúlaskipið" í Vestmanna. Nógvir mans og nógvir ungir dreingir vóru við hesum skipi, flestu úr Vestmanna, men eisini úr øðrum bygdum kring landið.



*Joen Pauli Johannesen, sum førdi Kap Farvel og Erling Davidsen, dekkari*